HAGTALSGRUNNURIN

# LEITA EFTIR TALVU

HAGSTOVA FØROYA

# Endamál

Tú kanst leita fyri skjótt at kanna, um viðkomandi hagtøl eru at finna í Hagtalsgrunninum.

## Soleiðis gert tú




Vilt tú t.d. vita okkurt um ferðslu ella ferðsluvanlukkur, skriva so **ferðsluvanlukkur** í teigin og trýst á **Leita**:




Tað vil siga at eingin talva inniheldur orðið **ferðsluvanlukkur**.

Skrivar tú í staðin **ferðsl*** í teigin, so koma fleiri úrslit. Nú finnur hon allar talvur, hvar orð sum byrja við “ferðsl” eru í:

Hagtalsgrunnur, leiting:

ferðsl* [Leita]

◉ Leita í øllum teigum ○ Leita bert í ☐ Talvuheiti ☐ Virði tekstur ☐ Virði kota

**Leitiúrslit: (7 funnin)**

| Talva |
| --- |
| SS02020 Fjarskifti, skift á slag og ferðslu (2003-2018) |
| SS03060 Ferðsluóhapp skift á sýslu, stað og slag (1995-2017) |
| RL02030 Løgregluvirksemi annars (1995-2018) |
| SS03040 Ársmiðalferðsla á teljistøðum (1994-2012) |
| MT6.1.4 Arbeiðsfjøldin eftir arbeiðsvirkni, arbeiðsstøðu, starvi, aldri og kyni |
| MT6.6.12 Fólk eftir arbeiðsstaði, føðilandi, starvi og kyni |
| MT6.6.14 Fólk eftir arbeiðsstaði, ríkisborgaraskapi, starvi og kyni |

Tað ber eisini til at leita eftir fleiri orðum ísenn. Vilt tú til dømis vita okkurt um skúlanæmingar, kanst tú leita eftir **skúl*** (gevur 33 talvur) ella **næming*** (gevur 20 talvur).

Um tú í somu leiting skrivar bæði orðini: **skúl* næming***, fáa vit allar talvur, ið innihalda annað orðið (gevur 37 talvur).

Um tú bara vilt hava tær talvurnar, ið innihalda *bæði* **skúl*** og **næming*,** skrivar tú **skúl* AND næming***, AND *skal* vera við stórum stavum (gevur 16 talvur).


Hagtalsgrunnur, leiting:
næming* AND skúl* | Leita

Leita í øllum teigum | Leita bert í | Talvuheiti | Virði tekstur | Virði kota

**Leitiúrslit: (16 funnin)**

| **Talva** |
|---|
| UV02010 Fólkaskúlin, næmingatal skift á skúla og flokk (2005/2006-2018/2019) |
| UV03020 Studentaskúli og HF-skeið, próvtøkur skiftar á deild, skúla og kyn (2000-2009) |
| UV02020 Fólkaskúlin, næmingatal skift á flokk og kyn (2005/2006-2018/2019) |
| UV03010 Studentaskúli og HF-skeið, næmingar skiftir á deild, flokk og kyn (1999/00-2009/10) |
| UV03040 Teknisku skúlarnir, næmingar skiftir á flokk, øki og kyn (2000/2001-2009/2010) |
| UV03050 Teknisku skúlarnir, lærlingatilgongd skift á aldur, lærubólk og kyn (2001-2011) |
| UV03060 Teknisku skúlarnir, lærlingatilgongd skift á landaøki læruplássins, slag og kyn (2001-2011) |
| UV03030 Handilsskúlin, næmingar skiftir á flokk, øki og kyn (1999/2000-2011/2012) |
| UV03070 Fiskivinnuskúlin, næmingar og lærlingar skiftir á flokk og kyn (1999/00-2011/12) |
| UV03080 Almanna- og heilsuskúlin, útskrivaðir næmingar skiftir á flokk og kyn (2001-2012) |
| UV04010 Sjúkrarøktafrøðiskúlin, lesandi skift á flokk og tikið prógv (2003-2010) |
| UV04020 Sjúkrarøktafrøðiskúlin, lesandi skift á flokk og tikið prógv (1992-2005) - endað |
| UV04030 Vinnuháskúlin, próvtøkur skiftar á útbúgving og kyn (2003-2017) |
| UV04040 Føroya Læraraskúli, lesandi skift á útbúgving, flokk og kyn (2000/01-2010/11) |
| UV04050 Fróðskaparsetur Føroya, lesandi skift á útbúgving og kyn (1998/99-2010/11) |
| MT2.1.2 Fólk í felagsbýlum eftir aldri, kyni og øki |

Viðhvørt koma so nógv leitiúrslit, at tú vilt leggja summi úrslit burturúr. Leitar tú til dømis eftir **fólk* AND húski*** koma 93 talvur fram, harav tær flestu eru frá manntalinum og eita okkurt við "MT...".

Manntalstalvurnar kunnu leggjast burturúr við minus-tekninum: **fólk* AND húski –mt***

Nú verða bert 5 talvur funnar




Leitað verður í øllum tesktum og kotum í hagtalsgrunninum, Men tú kanst eisini áseta, at tú bert vilt leita í pørtum av grunninum. Vilt tú t.d. bert leita í talvuheitunum, kanst tú avmerkja hetta, áðrenn trýst verður á **leita**.

